# Lundabók í tøkum tíma

**Fuglafrøðingurin, Jens-Kjeld Jensen í Nólsoy, hevur á egnum forlagi givið út eina sera áhugaverda bók um lunda og lundaveiði. Hetta er ein partur av okkara mentan, sum er um at fara í søguna, og tí má sigast, at tað er í tøkum tíma, at hetta verður felt niður á blað**



René Hansen situr her í Jógvan í Lon'sa sessi, sum er lágættarsessurin hjá Bøkki. Hann hevur júst fingið ein lunda í netið

BÓKAÚTGÁVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bókin hevur verið í umbúna leingi.

- Tað munnu vera eini tíggju ár síðani eg byrjaði at savna myndir til bókina, og fyrstu vísindaligu greinina um lunda skrivaði eg longu í 1982, sigur høvundurin, Jens-Kjeld Jensen.

Bókin er sera áhugaverd og upplýsandi, og ein høvuðsætlanin við henni er júst at varðveita vitanina um lundan og ikki minst um lundaveiði, fyrst og fremst lundafleyg.

Byrjað verður við at greiða frá um lundan og teimum lundasløgum, sum finnast um okkara leiðir. Sagt verður frá um hvussu lundi byggir sær holu, hvussu og nær hann verpur, hvussu hann føðir ungan, hvussu tað ber til at aldursmeta lundan, og hvussu lundin er fyri í løtuni.

Bókin er ógvuliga upplýsandi og greiðir frá ymiskum í sambandi við lundafleyg, sum sjálvt royndir fleygamenn ikki vita. Til hendan partin av bókini og um lundafleyg í síni heild, hevur Kristin Holm, sáli, verið heimildarmaður. Ikki untist Kristini at uppliva hetta valaverk á prenti, og tað er tí ikki so løgið, at Jens-Kjeld Jensen hevur valt at ogna Kristini Holm bókina.

Ein partur av teirri vitan, sum Jens-Kjeld Jensen hevur notið gott av frá Kristini Holm eru heitini á ymsu pørtunum av fleygastongini, har serliga armar og net er ein vitan fyri seg. Heili 14 ymisk heiti finnast á fleygastongini, og tey munnu teir fægstu kenna øll.

Síðani verður greitt frá skipanini í Nólsoy, hvør hevur rættin til at ganga á fleyg, hvussu avgjørt verður, hvør skal í hvønn sessin, og áhugaverd hagtøl yvir veiðina seinastu árini og hvussu nógv er fleygað í hvørjum sessi yvir eitt ávíst tíðarskeið.



René Hansen og Kristin Holm á veg heim av Urðini við hvør sínari byrðu á herðunum. Bókin, sum Kristin Holm í stóran mun hevur verið heimildarmaður at, er ognað honum

## Eisini á enskum

Jens-Kjeld Jensen er tilfluttur nólsoyingur, og tí er tað ikki so løgið, at bókin fyri størsta partin byggir á lundaveiði í Nólsoy.

Høvundurin hevur verið við Kristini Holm á fleyg mangar dagar, og hann hevur eitt tjúkt myndaalbum við myndum frá hesum mongu fleygadøgum suðuri á Urð. Her hevur hann eisini fingið innlit í lundaveiði í praksis, og við at kanna gomul skjøl kann høvundurin staðfesta, at lundaveiða er farin fram óbroytt helst líka síðani víkingatíðina.

Ein onnur áhugaverd upplýsing, sum finst í bókini, er ein meting av lundastovninum í Føroyum. Hann er mettur til 550.000 pør, harav millum 35.000 og 50.000 pør metast at finnast í Nólsoy.



Tað er ein ógvuliga áhugaverd og upplýsandi bók, sum Jens-Kjeld Jensen hevur greitt úr hondum

Bókin er skrivað á donskum, og tað hevur sínar orsøkir. Burtursæð frá, at Jens-Kjeld Jensen er dani, og tað harvið liggur betri fyri hjá honum at skriva á donskum, so røkkur danska málið einum munandi størri lesaraskara.

- Tá bókin er skrivað á donskum, ber til hjá norðurlendingum at skilja hana. Hartil havi eg eisini ætlanir um at geva bókina út á enskum máli, tí tað finst ógvuliga lítið tilfar á enskum um lunda, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Tað er knappliga eitt ár síðani høvundurin veruliga fór undir at skriva bókina, sum í stóran mun byggir á vísundaligar greinar, sum Jens-Kjeld Jensen sjálvur hevur skrivað ella veri við til at greiða úr hondum.

Bókin er prentað í einum upplagi upp á 150 eintøk, men hóast hon ikki kom út fyrr enn beint undan vikuskiftinum, so var hon longu útseld mánadagin. Men ráð eru fyri tí.

- Eg ringdi til Sjónband mánamorgunin um at fáa prentað fleiri bøkur, og longu týsdag seinnapart eru tær klárar at avheinta. Og tað haldi eg vera nokk so fantastiskt, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Higartil hevur bert borið til at keypt bøkurnar í Havn – og Nólsoy, sjálvandi – men nú fer eisini at bera til at keypa tær í Suðuroy og í Klaksvík.